Livið sum MILLIÓNINGAR í tríggjar dagar

Luksusferð við Norrönu - við lummapengum



Hugsa tær. Eina ferð við Norrønu, har tú og makin kunnu njóta ekslusivu atmosferuna í suituni á glæsiliga ferðamannaskipi føroyinga. »Jú, men tað kostar« vilja summi helst halda, men tað nýtist nú ikki at kosta so nógv.

Saman við Smyril Line og Føroya Sparikassa gevur Sosialurin nevnliga tær møguleikan at fara á dreymaferðina. Ferðast sjálvur annar á eini av rutunum hjá Smyril Line við øllum tí marglæti, sum stóra ★★★ ferðamannaskipið gevur tær.

Og tað er ikki nóg mikið við tí. Umborð á Norrønu hevur tú eisini sersømdir, tí Føroya Sparikassi gevur tær eina konto umborð, har tú kanst nýta upp til 10.000 kr. á ferðini. So skuldu ráðini verið til bæði eitt og annað.

Umframt høvuðsvinningin, verður eisini ein eykavinningur drigin. Hesin er ein ferð fyri tvey vaksin og tvey børn við bili til Danland í Blokkhus í eina viku.

Og tað er sera einfalt at vera við í kappingini. Sjey leygardagar á rað verður spurnarblað í Sosialinum, har tríggir spurningar skulu svarast. Fyrsta spurnarblaðið var í blaðnum 11. september, og er talan hesaferð sostatt um næsta umfarið. Tá øll spurnarbløðini eru svarað, skulu hesi sendast okkum í einum brævbjálva. Brævbjálvin skal merkjast »dreymaferð« og skal sendast til:

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Bert seðlar, sum eru kliptir úr Sosialinum kunnu vera við í kappingini. Loyvt er ikki at senda avrit av seðlum.

Saman við svarlepanum skulu vit hava upplýsingar um navn, bústað og tlf. nummari hjá tær. Svarleparnir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 27. oktober, og leygardagin, 30. oktober verður so almannakunngjørt, hvørji eru hepnu vinnararnir.

Sosialurin

DREYMAFERÐIN 3. UMFAR

Evnið hesaferð er aftur Norröna. Vit skulu hava svar upp á tríggjar spurningar. Nevnliga:

1 Hvør er býurin, sum í 22 ár hevur verið atløgustaðið hjá Norrönu í Noregi?

2 Hvør fuglur ímyndar búmerki, sum sæst á skorsteinunum á Norrönu?

3 Hvør er skiparin, sum øll árini hevur verið partur av stjórnini hjá Smyril Line?



SELJARI SØKIST

Av tí at sølan av retail, catering og feskum vørum er í støðugari menning søkir P/F United Seafood eftir seljara.

United Seafood eigur 7 fiskavirkir og eru hesi spjødd um alt landið.

Felagið hevur drúgvar royndir við at hagreiða øll fiskasløg, serliga upsa, tosk, hýsu, svartkalva og kongafisk.

Vørurnar, ið virkaðar verða, eru á høgum góðskustigi og fevna um m.a. frystar vørur, saltaðar vørur, feskar vørur, catering vørur og retail vørur.

Uppgávurnar hjá seljaranum verða m.a.

- samstarv og samskifti við keyparar av vørunum
- samstarv um keyp av ráváru
- samstarv við søluleiðslu og virkisleiðarnar

Ynskiligt er at umsøkjarin hevur hesar førleikar

- relevanta útbúgving á passandi støði
- kunnleika til og royndir innan sølu av fiski
- kunnleika til framleiðslu á fiskavirkjum
- góðan málkunnleika
- góð samstarvs- og kommunkatiónsevni

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Umsóknarfreistin er 25. oktober.

Um áhugi er fyri hesum starvi, kunna tygum seta tygum í samband við:

UNITED SEAFOOD, P/F Føroya Fiskavirking
att: Símun P. Jacobsen
Postboks 218
FO-110 Tórshavn, Føroyar
Tel +298 35 55 55
Fax +298 35 55 50

UNITED seafood "Fish products from pristine waters"

REPROZ

Stovnið breiðband fyri

0,- kr.*)

Prísir úr 280,- kr./mðr.

Stovnar tú I-net Privat Breiðband frá Føroya Tele, geva vit tær stovningina púra ókeypis - tú sparir 750,- kr.

Nýtslutørvur	Nýtslumynstur	Prísur/mðr.	Ferð	Nýtslugjøld
Lágur	Surf, postur, chat og spæl	**Kr. 280,-**	256k/128	50 oyru/Mbyte. kl. 08-18 40 oyru/Mbyte. kl. 18-08 Nýtt Príslækking!
Miðal til stórur	Surf, postur, chat, spæl og tónleikur	**Kr. 595,-**	512k/128	**ÓKEYPIS upp til 2 Gbyte** 50 oyru/Mbyte. kl. 08-18 40 oyru/Mbyte. kl. 18-08 Nýtt Príslækking!
Stórur	Surf, postur, chat, spæl, tónleikur og filmur	**Kr. 895,-**	1024k/128	**ÓKEYPIS upp til 3 Gbyte** 50 oyru/Mbyte. kl. 08-18 40 oyru/Mbyte. kl. 18-24 **ÓKEYPIS** kl. 24-08 Nýtt Príslækking!

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

I·net BREIÐBAND

**) Treytað av at tú teknar I·net privat breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 1. novembur 2004. Vanligur prísur fyri stovning er kr. 750,-. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.*

FØROYA TELE

petur & petur • 320870

HAVNAR BIO

Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Leygardagin 25.09. kl. 20^{30}
Leygardagin 25.09. kl. 23^{30}
Sunnudagin 26.09. kl. 19^{30}
Sunnudagin 26.09. kl. 22^{30}



Leygardagin 25.09. kl. 19^{00}
Leygardagin 25.09. kl. 21^{15}
Sunnudagin 26.09. kl. 18^{00}
Sunnudagin 26.09. kl. 20^{15}



Leygardagin 25.09. kl. 23^{00}
Sunnudagin 26.09. kl. 22^{00}

Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.
Leygardagin 25.09. kl. 17^{00}
Sunnudagin 26.09. kl. 16^{00}

Við enskari talu og donskum teksti – Billettprísur: 55,- kr.
Leygardagin 25.09. kl. 18^{30}
Sunnudagin 26.09. kl. 17^{30}

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu